# Fundarbók hjá Eysturkommunu ____________/____________ Síða
# 520 Leirvík

**Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig,skr.**

## Býráðsfundur mánadagin 25. januar 2016 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **15/00282**<br>**Marknaumskipan matr. nr. 81, 82 og 66f í Norðragøtu**<br>Eftir áheitan frá eigara av nevndu matriklum hevur umsitingin arbeitt við málinum fyri at fáa hetta lýst við atliti til støðutakan um marknaumskipan. Nevndu matriklar hava servitutt uppá almennan veg.<br><br>Umsitingin mælir frá at gera marknaumskipan við atliti til almennan veg, tí at allir partar av matriklunum, ikki hava áhuga at fremja marknaumskipan.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá umitingini, men bjóða umsøkjaranum at kommunan yvirtekur vegin og heldur vegin viðlíka í framtíðini. | Einmælt samtykt at kommunan bjóðar seg at keyp matr. nr. 66f og part av matr. nr. 81 fyri 110,00 kr./$m^2$. |
| 2. | **15/00417**<br>**Umsókn frá Ognahaganum um øki til seyðahús í Leirvík**<br>Kommunan hevur móttikið umsókn um ummæli til sundurbýti og matrikulering í sambandi við at fáa øki til seyðahús, sum ein partur av matr. nr. 145. Saman við umsóknini er tekning sum lýsir hvat verkætlanin fevnir um.<br><br>Umsitingin mælir til at viðmæla loyvi til sundurbýti í Ognarhaganum matr. nr. 145 sambært umsókn og lýsing av málinum.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla loyvi til sundurbýti í Ognarhaganum matr. nr. 145 í Leirvík. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 25. januar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

| | | |
|---|---|---|
| **3.** | **15/00418**<br>**Umsókn um at víðka um verandi altan á matr. nr. 215 í Leirvík**<br>Kommunan hevur móttikið umsókn um byggiloyvi at útbyggja verandi altan til carport/bilskýli. Í sambandi við bilskýlið skal byggjast nærri granna enn heimild er til og nærri grannamarki enn 2,5 m, er málið sent til grannahoyring sambært fyri-sitingarlógini.<br><br>Umsitingin mælir frá at geva byggiloyvi til carport/bilskýli, tí at bygt verður nærri grannamarki enn 2,5 m og har altanur/terrassa er lyft upp frá jørðini, eisini er sera trongt millum húsini og tað verður torført at koma til matr. nr. 222, sum er eitt neyst.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at geva byggiloyvi til carport við støðutakan í grundgevingunum hjá umsitingini. | Málið tikið av skrá. |
| **4.** | **15/00427**<br>**Góðkenning av rakstraræltan fyri 2016 fyri Kongshavnar havn**<br>Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi rakstraræltan | Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi rakstraræltan. |
| **5.** | **16/00021**<br>**Góðkenning av roknskapur bókasøvnini 2015**<br>Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap | Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap. |
| **6.** | **16/00010**<br>**Vinnuøki C2 á Kráartanga**<br>Upplegg frá teknisku umsiting til skilmarking av Vinnuøki C2 á Kráartanga<br><br>Vinnunevndin tekur undir við upplegginum frá teknisku umsiting, og mælir til at býráðið arbeiðir víðari við málinum. Samstundis mælir Vinnunevndin til, at vinnuøki C2 í Norðragøtudali og vinnuøkið á kajini í | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 25. januar 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

Norðragøtu verða skilmarkaði.

**7. 16/00011**

**Vinnuøki C2 á Toftanesi í Leirvík**

Upplegg frá teknisku umsiting til skilmarking av vinnuøki C2 á Toftanesi.

Vinnunevndin tekur undir við uppleggingum frá teknisku umsiting, og mælir til at býráðið arbeiðir víðari við málinum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**8. 13/00010**

**Framtíðar framhaldsdeild í Eysturkommunu**

Mentanarnevndin tekur undir við áheitanini hjá stýrisbólkinum frá 15. januar 2016, um at fremja felags kunning og hoyring fyri borgarunum í kommununum, so borgarar kunnu fáa innlit í tað sum higartil er gjørt.

Samstundis heitir Mentanarnevndin á umsitingina um at kalla verkætlanarbólkin, sum handaði tilmælið til Eysturkommunu tann 30. Juni 2014, saman, fyri at gera kanningar av øðrum møguleikum, sambært býráðssamtykt tann 26. oktober 2015. t.v.s. Runavík og Klaksvík.

Arbeiðssetningurin frá 31. mars 2014, má tillagast. Viðkomandi tættir úr arbeiðssetninginum frá várinum 2015 (punkt 2.2. s.6) eiga at verða tiknir við. Hesir upplýsingar skulu fyriliggja, áðrenn omanfyrinevnda kunning og hoyring fer í gongd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



## Býráðsfundur mánadagin 25. januar 2016 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

Oluffa Joensen ____________________________________________

Brandur Jacobsen ____________________________________________

Emma Rasmussen ____________________________________________

Ólavur Olsen ____________________________________________

Hanna Jensen ____________________________________________